# Ítróttarblaðið

**Ítróttartoymið á Sosialinum:**



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo



Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo



Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo



Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo



Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo

## Eingin landsdystur í sjónvarpinum

Kringvarp Føroya fer ikki at vísa landsdystin millum Italia og Føroyar í sjónvarpinum. Kringvarpið vísir heldur ikki dystin, tá Føroyar vitjaði í Estlandi. Tá segði Annika Mittún Jacobsen, stjóri í Kringvarpinum, at tað vóru eingir tøkir pengar. – Prísurin fyri dystin er dýrari enn hann plagar at vera, so vit hava raðfest ikki at vísa landsdystin, segði hon við Sosialin tá. Hon legði afturat, at um kostnaðurin verður hin sami, so skulu føroyingar ikki væntað at síggja fleiri landsdystir í sjónvarpinum í framtíðini. Og nú er greitt, at eingin landsdystur verður í sjónvarpinum. Útvarpið fer hinvegin at siga beinleiðis frá dystinum.



*savnsmynd*

**Lesnaðurin er tíðarkrevjandi í løtuni, og eg seti meg ikki føran fyri at brúka nógva tíð upp á landsliðsfótbólt samstundis**

ATLI DANIELSEN



**Prandelli fær landsliðið aftur á beint**

GIANFRANCO ZOLA UNDAN LANDSDYSTINUM Í MORGIN

**Hóast vit raktu ikki serliga væl, tí vindurin darvaði, so eydnaðist tiltakið væl**

JONHARD KLETTHEYGGJ UM LANDSDYSTIN MÓTI HETLANDI

# Annika Vang stóð royndina



*savnsmynd*

**BOGASKJÓTING**

**Annika Vang stóð royndina sum altjóða ungdómsdómari í bogaskjóting í gjár**

Uni Holm Johannesen

Hon vendi nøsini móti Shanghai fyri nøkrum døgum síðan at luttaka í altjóða ungdómsdómara seminari saman við 14 øðrum úr øllum heiminum.

Seminarið var í tveir dagar, har tey millum annað skuldu vitja, meðan World Cup kapping var. Seminarið endaði í gjármorgunin við skrivligari roynd, sum var í tríggjar tímar.

Bogaskjótisamband Føroyar boðar frá, at Annika Vang stóð royndina við sera góðari umtalu. Hon stóð royndina so væl, at hon hevur møguleikan at døma til altjóða kappingar fyri vaksin.

11 av 15 stóðu royndina.

*uni@sosialurin.fo*

# Avgerðin verður tikin um fýra vikur

**FÓTBÓLTUR Frankie Jensen og umboð fyri nevndina í B71 vóru í rættinum hósdagin í royndini at finna eina niðurstøðu í málinum, har Frankie Jensen vil hava pengarnar, sum felagið, sambært honum, skyldar honum.**

Uni Holm Johannesen

Frankie Jensen hevur ikki stórvegis viðmerkingar til málið í løtuni. Hann sigur, at eingin niðurstøða er funnin, og báðir partar grundgóvu fyri sínum sjónarmiðum.

Hann metir, at avgerðin verður tikin í málinum um fýra vikur.

Málið snýr seg í stuttum um, at Frankie Jensen varð sagdur úr venjarastarvinum í B71 í fjør, tí tað var stríð millum hann og leikararnar. Jensen hevði sáttmála við felagið úr Sandoynni fyri tvey ár, og hann metir seg hava rætt til pengarnar.

Upphæddin er gott og væl 250.000 krónur.

Tað eydnaðist ikki at fáa viðmerking frá Ragnar Fossdalsá, sum er formaður í B71.



*savnsmynd*

## *Rýmdu av vøllinum*

Suðuroyarportalurin skrivar um vikuskiftið, at triðbesta liðið hjá EB/Streymi rýmdi av vøllinum undir útidystinum móti Royn. Seinni fjórðingsfinaludysturin millum liðini í 3. deild skuldi avgreiðast á grasvøllinum í Hvalba. Men sundalagsmenninir vóru so misnøgdir við dómaran, at teir takkaðu fyri seg og fóru inn í skiftirúmið, og síðan vendi nøsini móti Sundalagnum. Suðuroyarportalurin skrivar, at venjarin hjá EB/Streymi fór inn á vøllin, tók í hondina á dómaranum og takkaði fyri dystin. Tungan á vágskálini var, tá dómarin dømdi fríspark til Royn. Málverjin rann rópandi til dómaran, samstundis sum heimaliðið ger skjótt av og sendir bóltin í tóma málið. Hvalbingarnir øktu til 2-0. Royn hevur sostatt vunnið seg víðari í hálvfinaluna. EB/Streymur vann fyrra dystin 3-2.

*uni@sosialurin.fo*